# Okkara Oyrasund



**Ongastaðni í heiminum búgva so nógvir føroyingar á so fáum fermetrum, sum teir gera á Oyrasundskollegiinum á Amager í Keypmannahavn. Tað er staðið, har tú fært loyvi at vera føroyingur í Danmark, men samstundis er tað eisini har, at tú avbyrgir teg sjálvan frá Danmark, dønum og føroyingum, sum búgva aðrastaðni enn har. Heini, Súsanna og dóttirin Miriam búgva har, tað sama gera Ella og Helgi. Her greiða tey frá lívinum á Oyrasundi**

Rólant Waag Dam

Tey eru øll frá ymsum støðum í Føroyum, hava ymsa bakgrund og kendu ikki hvønn annan, tá tey búðu í Føroyum. Men tað gera tey nú, eftir at tey øll eru flutt av landinum til Keypmannahavnar í útbúgvingarørindum og búgva á Oyrasundskollegiinum á Amager – størsta kollegii í Norðurlondum við umleið 1500 íbúgvum. Tað finnist ikki nakað samlað yvirlit yvir, hvussu nógvir føroyingar búgva á Oyrasundskollegiinum, men tað ljóðar, at talið er millum 500 og 600.

### Fáa føroyskt netverk

Millum hesar mongu føroyingar, teljast Súsanna og Heini, sum búgva á Oyrasundskollegiinum saman við dóttrini. Tey fluttu niður í 2008 og beint á Oyrasund, uttan at søkja ella troyta aðrar møguleikar áðrenn.

– Vit vildu búgva her, tá vit fóru niður við einum barni. Vit ynsktu, at tað skuldi vera trygt og hetta er perfekt til eina barnafamilju, greiðir Súsanna frá.

– Tá tú hevur børn og ikki býrt tætt upp at familjuni, so hevur tú brúk fyri einum øðrum netverki. Tað hava vit her við øllum vinfólkunum, sum búðu her áðrenn vit komu, og sum vit eisini hava fingið síðani, leggur Heini aftrat.

Tá Helgi flutti niður í 2004, var fyrsta adressan eisini á Dalslandsgade, har Oyrasundskollegiið er.

– Eg søkti bara Oyrasund. Tað var ikki eitt must, at tað skuldi vera tað, men har búðu øll hini, sum eg kendi tá. Í ár eru tað sjey ár síðani, eg kom her av fyrstan tíð og eg kundi ikki funnið upp á at flutt, sigur Helgi avgjørdur.

Ein av orsøkunum er føroyska netverkið, sum Heini og Súsanna eisini vísa á.

**» Tá tú hevur børn og ikki býrt tætt upp at familjuni, so hevur tú brúk fyri einum øðrum netverki. Tað hava vit her við øllum vinfólkunum**

– Eg møti nýggjum vinum her, bygdafólk, sum eg annars ongantíð annars hevði lært at kent. So hóast tað bara eru føroyingar, eg havi lært at kenna her, so er tað kortini ein heilt nýggj verð. Vinmenninir, sum eg fylgist mest við í Danmark, eru fólk eg havi lært at kenna á Oyrasundi, fortelur Helgi.

### Oyrasund var ikki meiningin

Søgan hjá Ellu er í so máta øðrvísi. Hon og sjeikurin, Høgni Hansen úr Tjørnuvík, fluttu niður í 2009, men búsettust á Frederiksberg.

– Tá vit skuldu flyta har frá, høvdu vit aðrar ætlanir, men brádliga var Oyrasund ein møguleiki, sum eisini var bíligur samanborið við so nógv annað, so vit valdu at royna tað, greiðir Ella frá.

Flestu vinkonurnar hjá Ellu búgva eisini á Oyrasundi, so tær sær hon munandi meiri til, enn hon gjørdi áður. Ella trívist eisini væl á Oyrasundi, men dugir eisini væl at sígga, at tað ikki einans eru fyrimunir við at búgva har.

– Tað eru eisini vandar við hesum. Ein er, at tú ikki verður nóg væl integreraður í danska samfelagnum, sigur Ella og sipar til, at tað í stóran mun ber til at liva eina føroyska tilveru í danska høvuðsstaðnum.

Tað eru nevniliga nógv dømi um fólk, sum búgva á Oyrasundi, spæla hondbólt, fótbólt ella flogbólt við ÍF Føroyum, ganga í Kristnastovu og Eliaskirkjuni ella í Føroyahúsinum og Skarv. Tá er tað bara útbúgvingin, sum hálar teg inn í danska samfelagið av og á.

Og á Oyrasundskollegiinum eru so nógvir hentleikar, at tað fyri so vítt ikki er neyðugt at fara út um matrikkulin. Har er lesirúm, teldurúm, venjingarhøli, borðtennis, sparkivøllur, fimleikahøll, ymisk verkstøð, venjingarhøli til tónleik, veitsluhøli, barr, vaskarí og ein grillbarr við pitsa og øðrum grillvørum.

Integratiónin var eisini ein orsøk til, at Ella valdi at spæla flogbólt við einum donskum felag, heldur enn at velja flogbóltsdeildina hjá ÍF Føroyum.

### Avbyrgd frá øðrum

Heini og Súsanna og eisini Helgi duga væl at fylgja sjónarmiðunum hjá Ellu. Tey vísa eisini á, at á Oyrasundi ert tú ikki bara í vanda fyri